www.oljan.fo

Jan Müller 25 - 06 - 2013

Stórur áhugi fyri oljuleitingini hjá DONG

Rólant Waag Dam úr Tinganesi. Tíðindini um, at danska oljufelagið DONG hevur fingið tillutað tvey nýggj leitiloyvi á føroyska landgrunninum, er nakað, sum hevur vakt ans í føroyska fjølmiðlaheiminum. Umboð fyri sjónvarpið, útvarpið og Miðlahúsið vóru øll møtt upp at fáa við, hvørji tíðindi landsstýrismaðurin við oljumálum, Johan Dahl, kundi borðreiða við, tá hann mánakvøldið bjóðaði inn til tíðindafundar í morgun klokkan 11 í Sjó- og Vektarbúðini í Tinganesi. Umframt hetta vóru eisini umboð fyri avvarðandi myndugleikar og fólk við tilknýti til vinnuna til staðar. Tað var Johan Dahl, sum bjóðaði vælkomin. Oljumálaráðharrin var sjónliga fegin um, at DONG vísir føroyska landgrunninum áhuga. Johan greiddi eisini frá, at DONG hevur verið við frá byrjan, tá fyrsta blað í føroysku oljusøguni varð skrivað og hann fegnaðist um, at danska oljufelagið nú ætlar at gera eina nýggja roynd at finna olju í Føroyum. Síðani handaði hann Søren B. Andersen, leitistjóra hjá DONG fyri Atlantsmótið og harvið eisini Føroyaøkið, undirskrivaðu avtaluna, sum altso leingir um oljuleitingina við Føroyar í umleið seks ár. Samstundis ynskti Johan Dahl Søren B. Andersen góða eydnu við leitingini og segði hann seg vóna, at føroyska samfelagið eisini fór at fáa ágóðan av virkseminum hjá DONG. Leitistjórin hjá DONG takkaði mangar ferðir, tá hann fekk sáttmálan. Í grein um nýggju avtaluna, sum varð kunngjørd á oljan.fo fyrr í dag, verður millum annað víst á, tøknin er nógv ment síðani DONG var við at bora Marjunbrunnin í síni tíð. Júst hetta tók Søren B. Pedersen eisini fram á tíðindafundinum. Hann minti eisini á, at DONG er við í fleiri fundum beint hinumegin føroyska markið, og at tað sjálvandi eisini hevur við sær, at tey í DONG eru bjartskygd um loyvini, sum tey nú hava fingið tillutað. Sjálv kunningin til fjølmiðlarnar tók ein lítlan hálvan tíma. Aftan á var áhugin stórur millum journalistarnar at fáa landsstýrismannin og leitistjóran at greiða nærri

frá avtaluni, hvat hon inniber og hvat tað kemur at týða fyri virksemið á føroyska landgrunninum. Hetta kunnu tit lesa meiri um aðrastaðni á síðuni, umframt at fylgja við seinni, tá samrøða við bæði Johan Dahl og Søren B. Andersen verða kunngjørdar. Myndir: Føroyingar við ymsum uppgávum í føroyska oljuumhvørvinum, sum allir fegnast um avtaluna við Dong. Fv. Heri Ziska, oddamaðurin á jarðfrøðiligu deildini á Jarðfeingi, Johan Dahl, oljumálaráðharri, Jógvan Elias W. Poulsen, umboðsmaður hjá Dong í Føroyum og Eli Lassen, stjóri á Atlantic Supply Base. Frá samkomuni í Tinganesi fyrrapartin. Myndatøka Rólant W Dam/oljan.fo